# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# TANN SAVNANDI TJÓÐARHÁTÍÐIN

Nú stundar til ólavsøku, tjóðarhátíð okkara. Fyri mong er ólavsøkan hægsta summarhátíðin, og fyri okkara kosnu menn og kvinnur á tingi og í landsstýri er ólavsøkan eisini nýggja byrjanin, tí á ólavsøku byrjar nýggja tingárið.

Høvuðsstaðurin er altíð – eins og føroyingar flestir – í sínum vakrasta búna á ólavsøku. Hesar dagarnar upp undir ólavsøku síggjast fólk snøgga um býin allastaðni, so alt er til reiðar at taka ímóti teimum túsundatals gestunum, sum leita sær í býin á ólavsøku. Hóast ólavsøkan er eitt við Havnina, so eiga vit øll ólavsøkuna – tí hon er tjóðarhátíðin hjá øllum føroyingum. Eisini nógvir av okkara landsmonnum, sum eru undir útbúgving ella hava fest búgv í útlondum, koma heim til at halda ólavsøku saman við vinum og kenningum.

Ólavsøkan savnar flestu okkara til gaman og álvara. Her eru ítróttartiltøk og mentanarlig tiltøk av ymsum slag. Tjóðbúnin er ongantíð so eyðsýndur, sum á ólavsøku og setir sín serstaka dám á hátíðina. Vit eiga ikki at undirmeta týdningin, sum ólavsøkan hevur fyri menniskjansliga sambandið. At tú hittir gamlar vinir og kenningar, sum tú ikki hevur sæð í mong mong ár. Gestablídni er í hásæti, og tú kennir teg vælkomnan alla staðni.



Ólavsøkan byggir brýr millum føroyingar flestar. Fíggindaskapur og vónloysi eru bráddliga horvin. Tolsemi, virðing og vinskapur standa harafturímóti ovast á breddanum.

Og tá so løgmaður trínur á tingsins røðarapall aftan á gudstænstuna ólavsøkumorgun er politiskt nýggjár. Tá fer Kaj Leo Johannesen at stinga kósina út í kortið – hann fer at greiða frá, hvørji politisk mál samgongun fer at seta sær næsta tingárið - og eitt tað fyrsta málið at fáa greiðu á er løgtingsfíggjarlógin fyri 2011 – búskaparliga grundarlagið undir samfelagnum.

**Ólavsøkan byggir brýr millum føroyingar flestar**

Enn kenna vit ikki smálutirnar í fíggjarlógaruppskotinum, men politikarar hava ikki dult fyri at sparast skal. Og at tað er neyðugt, tað kunnu vit helst øll verða samd um. Men tað má sjálvandi gerast við skili.

Kanska eisini politikarar liva upp til ólavsøkusangin hjá Poul F, tá hann sigur, at »ólavsøkan skal øld eftir øld reka burtur klandur og sorg«. Vit í Miðlahúsinum ynskja øllum eina góða ólavsøku.



# Útróðrarbørn hjá Amariel á ólavsøku

Ólavsøkuaftan og ólavsøkudag hevur listamaðurin Amariel Norðoy framsýning í Galerie Focus í Havn.

Amariel fer at sýna fram málningar, akvarellir og steinprent, og teamið er framvegis Útróðrarbørn – sálmar lívsins.

Amariel hevur í nógv ár brúkt útróðrarbørn sum tema í sínum verkum, og hann heldur fram við tí.

– Eg eri ikki liðugur at mála útróðrarbørn enn, og eg veit ikki, um eg nakrantíð verður liðugur við tey, sigur Amariel Norðoy.

Síðani seinast í sjeytiárunum hevur Amariel fingist við steinprent. Byrjanin var eitt sindur serlig, tí Amariel var staddur í Keypmannahavn til eina framsýning. William Heinesen var eisini í gallaríinum, og kendi danski rithøvudin og listamaðurin Hans Scherfig kom framvið. Hann var á veg av landinum, og tá helt William Heinesen fyri, at Amariel skuldi avloysa hann á einum verkstaði, har tey fingist við steinprent. Og tað slapp Amariel.

– Eg var rystandi nervøsur, tá ið eg fór í gongd, og eg gjørdi øll mistøkini, sum tað bar til, men eg havi hingið í við steinprenti síðani, sigur Amariel Norðoy.

Framsýningin hjá Amariel Norðoy verður opin ólavsøkuaftan og ólavsøkudag millum klokkan 16 og 18.



**Høpisleysir pástandir upp í saman**

JOHANNUS Á RÓGVU JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 10



**Javnstøðan byrjar í valstríðnum**

ANNITA Á FRÍÐRIKSMØRK
KJAK Á SÍÐU 9

# Dynamit við nýggjum sangi

Poppbólkurin Dynamit hevur verið í upptøkuhølunum og tikið nýggjan sang upp.

Sangurin eitur *Lat tey eiga* og snýr seg um, at sjálvt um tey úti í heimi eiga nógv gott, so skulu vit fegnast um okkara egna land, hóast veðrið kann vera so sum so.

– Sangurin er rættiliga einfaldur og snýr seg millum annað um, at vit kunnu ikki ganga og grenja um veðrið her í Føroyum, tí so grenja vit mest sum allatíðina. Vit kunnu ikki ganga og bíða eftir røttu løtuni, tá vit hava frí og veðrið er gott, vit skulu bara njóta okkara land, sum tað er, sigur Niklas Heri Jákupsson, sum er ein av tónleikarunum í Dynamit.

Hans Jacob Nystrøm syngur nýggja sangin, sum er farin í umfar á Rás2. Ætlanin er ikki, at sangurin skal gevast út á fløgu her og nú, men bert latast útvarpsstøðunum at spæla.

Dynamitt er annars á veg við nýggjari dvd-útgávu. Tað er ein pakki við live-fløgu og einum dokumentarfilmi um søguna hjá bólkinum. Dvd-pakkin kemur út í næstu viku.



Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*